

AFTUR Á SLÓÐINA: Nógv er uppi og vendir í horninum á Kondittarínum, har teir føstu fúsu hittast til morgundrekka hvønn dag

Mynd: Jens Kr. Vang

# Alt broytt uttan kundarnir

**Á kondittarínum í hjartanum í miðbýnum er alt broytt í mun til tað, sum tað var fyrr. Tað eru bæði starvsfólk og teir føstu fúsu samd um. Men tað er ikki einstýðandi við, at tað er broytt til tað verra**

KONDITTARÍIÐ
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Tað var næstan mett sum ein tragedia fyri teir føstu fúsu á Kondittarínum, tá tað lat aftur í fjør. Men nú hevur Nordin Manai sligið dyrnar uppaftur, og allir stamkundarnir streyma inn í hópatali. Men hóast møtistaðið hjá teimum mongu er latið uppaftur, so er tað ikki júst, sum tað plagdi at vera.

– Hetta er ikki tað sama. Her er vorðið eitt sindur kaldari inni, og kaffið smakkar ikki eins væl, sigur ein av teimum, sum hevur havt fastan sess í horninum á Kondittarínum.

Men teir eru allir á einum máli um, at tað er gott, at Kondittaríið er latið uppaftur. Meðan tað hevur verið stongt, hava teir hildið til uppi í Norðurlandahúsinum, og har hildu teir tað var fínt at vera. Minus-síðan var bara tann, at tað letur ikki upp fyrr enn klokkan 10 um morgunin.

– Kondittaríið liggur væl fyri, og vit ivast ikki í, at teimum ungu dámar betri hesar nýggju umstøðurnar, siga teir.

## Ongantíð tað sama

Teir eru eisini samdir um, at nú eru teir á ein hátt komnir heim aftur. Tó er nógv sum er broytt. Til dømis er tað sjálvtøka nú, og tað er eisini nakað ein skal venja seg við.

– Tað verður ongantíð tað sama aftur, so vit skulu líka venja okkum við hetta. Men tað verður uttan iva fínt.

Í horninum verður tosað um mangt og hvat. Beint nú er tað valið, sum stendur ovast á dagsskránni.

– Ja, alt sum verður samtykt í landsstýrinum og í Gundadali verður kjakast um her áðrenn, letur skemtandi úr einum, og allir hinir grína samtykkjandi.

Tríggjar av teimum, sum arbeiddu á kondittarínum áðrenn tað lat aftur, starvast nú aftur á Kondittarínum, og tað seta stamkundarnir stóran prís uppá.

– Tað hevur alt at siga, at tær eru her. Um tær ikki vóru her, so vóru vit neyvan sitið her nú.

## Broyttar umstøður

Tær báðar Randi Ziska og Ann Justinussen eru tvær av teimum, sum arbeiddu á Kondittarínum áðrenn, og sum nú eru vendar aftur til gamla arbeiðsplássi. Ann hevði arbeitt har í hálvt fjórða ár, tá tað lat aftur, og Randi hevði verið har í heili 28 ár.

– Tá vit fóru heim, so var tað ongantíð meiningin, at vit skuldu byrja aftur, sigur Randi Ziska.

– Men tá eg varð spurd, so mátti eg hugsa meg eitt sindur um, men eg valdi so at taka av.

Ann var hinvegin ongantíð í iva um, at hon fegin vildi aftur til gamla arbeiðsplássið.

– Tað tekur eitt sindur av tíð at venja seg við at vera aftur. Her er alt broytt uttan kundarnir, siga tær báðar.

Nú er úrvalið bæði størri og øðrvísi, og talan verður um bæði morgun- og frokostbuffét. Sum er nú, so er eisini bert opið í dagtímunum frá 9-18, men frá komandi viku, verður eisini opið um kvøldarnar.

– Sjálvt um alt er so nógv broytt, so eru vit ógvuliga spentar uppá hetta nýggja, sláa Randi Ziska og Ann Justinussen tó fast.



Á GAMLAR GØTUR: Randi Ziska og Ann Justinussen hava arbeitt her á Kondittarínum í ávikavist 28 og hálvt fjórða ár. Nú eru tær komnar aftur til gamla starvsplássið

Mynd: Jens Kr. Vang








*Bæði í heilsuverkinum og í fíggjarheiminum liggjan nógvar viðkvamar upplýsingar um fólk á teldu og telduskipanum. Um nakrar vikur kunnu stovnar sum Landssjúkrahúsið og fyritøkur sum Elektron vænta sær vitjan av Dátueftirlitinum, sum fer at kanna KT-trygdina saman við donskum serfrøðingi*

# Dátueftirlitið fer at kanna KT-trygd

**Um nakrar vikur kemur danskur serfrøðingur til Føroya at hjálpa Dátueftirlitinum við at kanna ta skinklandi KT-trygdina hjá fyritøkum og almennum stovnum. 1. september skulu øll lúka strongu krøvini í kunngerðini um trygd í sambandi við persónsupplýsingar**

TRYGD
*Eyðun Klakstein*

Síðani Dátueftirlitið fór at virka 1. januar í 2002, hevur eftirlitið ikki gjørt nakrar kanningar av, um almennir stovnar ella fyritøkur halda ásetingarnar í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum, sum nú fyri tað mesta liggja á teldum og á servarum kring landið.

Men nú skal tað verða.

Um nakrar vikur kemur ein danskur serfrøðingur til Føroya at hjálpa Dátueftirlitinum við at kanna føroyskar fyritøkur og almennar stovnar.

Maðurin, sum kemur frá danska dataeftirlitinum, hevur drúgvar royndir í at kanna KT-trygd, og hann skal leggja føroyska eftirlitinum lag á.

– Dátueftirlitið hevur avmarkaða arbeiðsorku, og tí hevur møguleiki ikki verið at kanna fyritøkur og stovnar higartil. Men nú verður hetta prioriterað, sigur Kitty May Ellefsen, sum er einasti fulltrúðin á Dátueftirlitinum.

## Trygdin manglar

Nýtslan av kunningartøkni (KT) er nógv vaksin seinastu árini, og nú verða mest sum allar persónsupplýsingar goymdar á teldu og á telduskipanum.

Alt frá upplýsingum um fíggjarviðurskiftum til heilsustøðu hjá fólki, og hetta er alt eymar upplýsingar, sum ikki eru ætlaðar øðrum enn nøkrum fáum fólkum.

Men við nýggju tøknini fylgja eisini nýggir vandar, og tað er kent um allan heim, at teldusníkar bróta inn í skipanir. Hetta hendir eisini í Føroyum.

Tí er tað umráðandi, at trygdin í teimum ymsu skipanunum er í lagi, so at eingin óviðkomandi sleppur fram at viðkvomum upplýsingum.

Men KT-trygdin í Føroyum er langt frá í lagi.

– Arbeiðið við trygdini í telduskipanum hjá bæði almennum og privatum hevur ikki verið raðfest nóg frammarliga, samstundis sum nýtslan av kunningartøkni er eksploderað. Tí má okkurt gerast fyri at betra um trygdina, sigur Ari Johanneson, formaður í KT-Forum, sum er sett at orða ein almennan politikk um KT og KT-trygd.

Fulltrúðin á Dátueftirlitinum er samd við formanninum í KT-Forum.

– Støðan kundi avgjørt verið betur, men hetta er ein avleiðing av, at menningin og nýtslan av kunningartøkni er vaksin nógv, men at nógv hava als ikki fylgt eftir við trygdini og kanska ikki hava hugsað stórvegis um tað, sigur Kitty May Ellefsen.

## Tíðarfreistin nærkast

Ein týðandi orsøk til, at Dátueftirlitið nú fer undir at kanna trygdina hjá fyritøkum og stovnum, er, at 1. september í ár skulu øll – almenn sum privat - lúka krøvini í sokallaðu trygdarkunngerðini, sum varð gjørd fyri einum lítlum ári síðani.

Kunngerðin um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum ger greitt, hvat tey, sum hava onkrar upplýsingar um fólk, skulu hava av trygd í og kring sínar skipanir. Kunngerðin er strang, og tí er tað krevjandi hjá privatum og almennum at uppfylla øll krøvini.

– Høvuðsorsøkin til tær komandi kanningarnar hjá okkum er, at vit vilja vita, um stovnar og virki eru farin undir arbeiðið at uppfylla krøvini í kunngerðini, sigur Kitty May Ellefsen, fulltrúði á Dátueftirlitinum.

– Summi av krøvunum eru trupul at lúka og krevja nógv av fyritøkum og stovnum, tí verður hetta ikki gjørt eftir einum degi. Men tað eru eisini krøv í kunngerðini, sum tað ber til at lúka beinanvegin við at gera greiðar mannagongdir og ásetingar, og vit fara at vita, hvussu tað gongur við hesum arbeiði, sigur hon.

Fulltrúðin vil ikki siga, hvar Dátueftirlitið fer at gera sínar kanningar, men ætlanin er í øllum førum at fara á vitjan stovnum ella fyritøkum, sum liggja inn við serliga viðkvomum upplýsingum um fólk.

## Upprit er liðugt

Landsgrannskoðarin hevur havt lemjandi atfinningar ímóti KT-trygdini hjá almennum stovnum, sum liggja inni við upplýsingum um fólk.

Hetta fekk í 2000 eina kavabólt á rull, sum hevur havt við sær nýggja lóg og kunngerðir um persónsupplýsingar. Eisini hava aðalráðini tikið seg saman í KT-Forum, har arbeitt verður við at orða ein KT-politikk og KT-trygdarpolitikk fyri landsfyrisitingina.

Hetta arbeiðið er komið so langt, at í hesum mánaðinum verður uppritið hjá KT-Forum lagt fyri aðalstjórararnar í teimum ymsu ráðunum.

Ætlanin er so, at aðalráðini hvør í sínum lagi skulu taka undir við nýggja KT-politikkinum og síðani gera tey átøk, sum eru neyðugt fyri fáa trygdina upp á pláss.

# Fóru avstað við fýra servarum

STULDUR
*Eyðun Klakstein*

Nýggjársaftan var ein ólukkudagur fyri donsku fyritøkuna Tilsted Communication, sum er ein reklamufyritøku við nógvum og fjølbroyttum virksemi.

Fyritøkan, sum hevur heimastað í Jútlandi, var fyri innbroti, og nakað av tí ringasta, sum kundi henda, hendi.

Fýra stórir telduservarar vórðu stolnir frá fyritøkuni, og tá neyðugu trygdaravritini ikki vórðu tikin, varð hetta mest sum ein vanlukka fyritøkuna. Eini 300 internetsíður, sum fyritøkan stendur fyri, brendu saman, og stór savn av myndum og øðrum fór fyri skjeytið.

Hetta er eitt dømi um, at tað ikki bara eru teldusníkar, sum kunnu hótta telduskipanir. Vanlig innbrot kunnu eisini hava álvarsamar avleiðingar við sær.

KT-stjórin hjá Tilsted fekk sekkin eftir hendingina, og síðani hava tey 42 starvsfólkini arbeitt døgnið runt fyri at fáa net, servarar og søvn hjá fyritøkuni at virka aftur.